## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, seinnapartin minni vindur av norði. Sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av norði og kavaælingur, men eisini onkur sólglotti. Hitalagið millum ÷2 og +1 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin minkar hann vindin niður í lot av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin um 3 stig. Týsdagin frískar hann vindin av suðri, men væntandi turt. Hitin millum 3 og 6 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# »Eg møtti manni mínum á alnetinum«

**31 ára gamla Arosiak Hammer er upprunaliga ættað úr Kuwait í Miðeystri. Hon arbeiðir í cafeteria umborð á Smyrli, er gift við Rúna Hammer og býr í Hvalba. Hon hevur bert búð her í tvey ár og nakrar mánaðir, men tosar bæði gott og skilligt føroyskt**

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*- Tað er gott at búgva í Hvalba, sigur ein brosandi Arosiak Hammer, sum upprunaliga kemur úr Kuwait. Har er hon útlærd innan fyri ferðavinnuna*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**■ Hvussu ber tað til at tú kom til Hvalbiar?**
– Eg og maður mín, Rúni møttust, tá vit chattaðu á alnetinum. Vit hittust fyrstu ferð í Keypmannahavn, og síðani kom eg til Føroyar á fyrsta sinni í november 2003.

**■ Hvussu er so at búgva í Føroyum?**
– Her er gott at búgva, vøkur náttúra og sera dámlig fólk. Her er eisini friðarligt og eingi problemir.

**■ Hvat er arbeiði títt umborð á Smyrli?**
– Eg arbeiði í cafeteria umborð á Smyrli. Her havi eg verið síðani í november mánaði í fjør sum avloysari, men eg vóni at fáa fast starv. Smyril er eitt gott skip og eitt gott arbeiðspláss.

**■ Hvat fær tú frítíðina at ganga við í Hvalba?**
– Eg chatti nógv saman við familju míni í Kuwait, serliga við beiggja mín og systur mína. Tey umhugsa at koma higar at vitja. Annars venji eg við vektum og tílíkum og eg súkkli eisini nógv.

**■ Hvørjum vil tú heilsa?**
– Elskaða manni mínum vil eg fegin heilsa. Hann siglir sum kokkur við trolaranum Steintór, men er heima beint nú.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -3 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | -1 |
| Lerwick | 0 |
| Aberdeen | -- |
| London | -5 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | -- |
| Oslo | -1 |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | -9 |
| Helsinki | -7 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | -3 |
| Warzawa | -4 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 15 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 8 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 2 |
| New York | 22 |
| Miami | 15 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 32 |
| Panama | 7 |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | 25 |
| Buenos Aires | |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1033 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum viknar. Eitt lágtrýst, 989 hPa. við Danmark fer eystureftir og grynnist.




**Í dag:**
Hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum viknar framvegis. Lágtrýstið við Lofoten fer í ein útsynning sunnan og gevur eitt skifti vaksandi vind á okkara leiðum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 1/3 kl. $06^{00}$– 2/3. $06^{00}$. Hitin í gjár: -0,5°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 1/3 kl. $06^{00}$– 2/3 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í februar: 0,1 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

27. februar Mánin næstur jørðini
28. februar Tendring
6. mars Fyrra kvarter
13. mars Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. Mars | 08.21 | 20.45 | 07.21 | 19.45 | 07.36 | 20.00 | 10.21 | 22.45 | 11.21 | 23.45 | 06.36 | 19.00 | 05.36 | 18.00 | 08.36 | 21.00 | 09.36 | 22.00 | 08.06 | 20.30 | 09.21 | 21.45 |
| 3. Mars | 09.08 | 21.31 | 08.08 | 20.31 | 08.23 | 20.46 | 11.08 | 23.31 | - | 12.08 | 07.23 | 19.46 | 06.23 | 18.46 | 09.23 | 21.46 | 10.23 | 22.46 | 08.53 | 21.16 | 10.08 | 22.31 |
| 4. Mars | 09.55 | 22.20 | 08.55 | 21.20 | 09.10 | 21.35 | 11.55 | - | 00.31 | 12.55 | 08.10 | 20.35 | 07.10 | 19.35 | 10.10 | 22.35 | 11.10 | 23.35 | 09.40 | 22.05 | 10.55 | 23.20 |
| 5. Mars | 10.46 | 23.12 | 09.46 | 22.12 | 10.01 | 22.27 | 00.20 | 12.46 | 01.20 | 13.46 | 09.01 | 21.27 | 08.01 | 20.27 | 11.01 | 23.27 | - | 12.01 | 10.31 | 22.57 | 11.46 | - |
| 6. Mars | - | 12.11 | 11.11 | 23.33 | 11.26 | 23.48 | 01.12 | 14.11 | 02.12 | 15.11 | 10.26 | 22.48 | 09.26 | 21.48 | - | 12.26 | 00.27 | 13.26 | 11.56 | - | 00.12 | 13.11 |


I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


BOXEN

**Vika 8 – 26. febr.**

1. Centrum:
**42 - 30 - 72 - 25 - 40 - 57 - 10 - 18 - 49 - 11 - 02 - 36**

1. Ramme:
**16 - 32 - 28 - 35 - 06 - 22 - 74 - 15 - 45 - 60 - 59 - 07 - 46 - 33 - 34 - 41 - 52 - 44 - 53 - 65 - 09 - 23 - 56 - 75 58 - 24 - 04 - 67**

Fuld plade:
**61 - 63 - 54 - 05 - 38 - 20**

Fri spil: **__XEN**

| | |
|---|---|
| Fuld plade: 1. pr. | **74.259,- kr.** |
| 1. Ramme: 2. pr. | **25.626,- kr.** |
| 1. Centrum: 3. pr. | **12.828,- kr.** |
| Ramme: 4. pr. | **1.309 ,- kr.** |
| Centrum: 5. pr. | **16,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

TIPS MÅL

## TIPS 12 úrslit
**Vika 8– 26 . febr.**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | West Bromwich - Middlesbr. | **2** |
| 2. | Manchester U - Wigan | **1** |
| 3. | Duisburg - Hertha Berlin | **1** |
| 4. | Hamburger SV - Stuttgart | **2** |
| 5. | Inter - Udinese | **1** |
| 6. | Juventus - Lecce | **1** |
| 7. | Palermo - Milan | **2** |
| 8. | Siena - Sampdoria | **1** |
| 9. | Athletic Bilbao - Villarreal | **x** |
| 10. | Betis - Real Sociedad | **1** |
| 11. | Espanyol - Sevilla | **1** |
| 12. | Espanyol - Sevilla | **x** |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 røtt: | **Eingin/0,- kr.** |
| 11 røtt: | **26.205,- kr.** |
| 10 røtt: | **1.168,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

5 707265 100050 >